# Bilar

Nr. 171 • hósdagur • 9. september 2004 • 78. árg.

# Reyni Service við nýggjari tænastu




*Reyni Service bjóða nú 6 mánaða brúktbilagaranti upp á bilar, sum kosta meira enn 85.000 krónur. Á myndini Olivar Danielsen, sølumaður*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Í lýsingum í bløðunum bjóða Reyni Service nú eina heilt nýggja tænastu og eina eyka trygd til tey, sum ynskja ein brúktan bil við nærum eins góðari trygd, sum var hann nýggjur**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Reyni Service bjóða nú 6 mánaða garanti upp á teirra brúktu bilar, sum kosta meira enn kr. 85.000,- Garantiskipanin hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,- . Skipanin fevnir um øll knappliga íkomnin brek, ið ikki skyldast nýtslu brúkarans so sum rust, uttanífrá komnar skaðar ella vantandi tænastueftirlit og við-líkahald.

Frá Reyni Service verður sagt, at endamálið við hesi skipan er, at tann sum keypir ein brúktan bil frá teimum, ikki skal verða bangin fyri óvantaðum útreiðslum av knappliga íkomnum breki, tað verði seg á motor, gearkassa ella annað, sum er umfatað av hesum brúktbilagarantinum. Hesi brek verða umvæld uttan hóvasták við eini sjálvsábyrd uppá einans kr. 500,-

# VW Fun Roadster í 2007

**Fun Roadster er navnið á framtíðar sportsvogninum hjá VW, sum skal koma á marknaðin í seinasta lagi í 2007. Fun Roadster verður ein léttur og kvikur 2-persónabilur, ið verður drivin av bakhjólunum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

VW Fun Roadster, sum einans vigar 600 kg, verður gjørdur við tí fyri eyga at hann skal vera kvikur og liggja væl á vegum - serliga í svingum.

Tveir 1,0 motorar við 100 hk verða at velja í millum, annar bensin og hin diesel. VW stjórin, Bernd Pischetsrider, lovar, at bilurin kemur at koyra frá 0-100 km/t upp á undir 7 sekund, og verða líka kvikur sum ein Porsche Boxster.



*VW Fun Roadster verður ein léttur og kvikur 2-persóna sportsvognur við eini eginvekt upp á einans 600 kg.*

## Suzuki Swift



Konseptbilurin Suzuki Concept S kemur komandi ár á marknaðin sum nýggi Suzuki Swift. Conseptbilurin er ein 4x4 við 1,6 litur motori og 6 girum
*Kelda: Nyt om Biler*

## Toyota Micro



Toyota og PSA (Peugeot og Citroën) samstarva um ein lítlan bil við felags plattformi. Allir verða teir gjørdir á somu verksmiðju í Kekkia
*Kelda: Nyt om Biler*

## Peugeot 107



Peugeot útgávan av felags plattforminum PSA / Toyota, sum verða framleiddir í Kekkia, verður 107, sum kemur at avloysa Peugeot 106
*Kelda: Nyt om Biler*



# Citroën C4 við innbygdum anga

**Seinni í ár kemur ein heilt nýggjur Citroën C4 á marknaðin. C4 er ein spennandi nýggjheit við nógvari nýhugsan, t.d. ber til at velja ímillum níggju ymiskar luktir í kabinuni**

BILAR
*MagnusGunnarsson*
*maggi@sosialurin*

Citroën C4 kemur sum avloysari fyri núverandi Citroën Xsara. Talan verður um ein spennandi bil, sum fæst við nógvum nýggjum tøkniligum hentleikum.

Sum nakað heilt nýtt er ein luktspreiðari við níggju ymiskum luktum innbygdur í ventilatiónsskipanina. Við hesum luktspreiðaranum verður ikki brúk fyri grønu Wunderbaum jólatrøunum, sum vóru ógvuliga populer fyri nøkrum árum síðan.

Sum eykaútgerð fæst ein skipan, har infrareyðir sensorar halda eygað við strípunum í vegnum og útloysa ein vibrator í førarasetrinum, um bilurin skiftir breyt, uttan at blunka verður tann vegin, sum bilur fer. Hetta kann vera sera hent, um t.d. bilførarin sovnar undir koyring.

Rattið er eisini annarleiðis, enn vit eru von við. Sjálv miðjan í rattinum (rattnavið), við Citroën búmerkinum, flytur seg ikki, men bert rattkkransurin flytur seg, tá bilførarin snarar rattið.

Øll instrumentini uttan snúningsteljarin eru í miðjuni á instrumentborðinum og ljósið í instrumentunum tillagar seg ljósviðurskiftunum - um tað t.d. er myrkt, sterk sól o.s.fr.

Fimm ymiskir bensinmotorar vera at velja í millum frá 1,4 litur við 88 hk til 2,0 litur við 177 hk, og tríggir HDI dieselmotorar frá 90 til 136 hk.

ESP (Elektronisk Stabilitets Program) verður standard í øllum útgávunum.

Citroën C4 kemur væntandi á marknaðin síðst í hesum árinum.



*Citroën C4 við fimm hurðum. Tað at Citroën búmerkið er innbygt í kølaragittarið verður eitt sereyðkenni fyri nýggju Citroën bilarnar, sum koma á marknaðin*



*Soleiðis sær C4 út innan. Øll instrumentini uttan snúningsteljarin eru í miðjuni á instrumentborðinum. Rattnavið, við Citroën búmerkinum, flytur seg ikki, men bert rattkkransurin flytur seg, tá bilførarin snarar rattið*



*C4 við fimm hurðum aftan. Baklyktir í Ford Focus stýli*



*C4 við 3 hurðum er rættuliga sermerktur aftan við spoilara og rúti millum baklyktirnar*

# Ampi av vaksandi ferðslu gjøgnum Søldarfjørð

**Søldfirðingar bíða framvegis eftir tunli undir høvuðsvegin við skúlan, samstundis sum tann tunga ferðslan sannlíkt fer at økjast enn meira i næstum**

VEGAKERVI
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Eingin kann undrast á at fólk í Søldarfirði leingi hava kent ampa av tí nógvu ferðsluni sum gongur beint gjøgnum bygdina. Ein landsvegur við landsins hægsta prosentparti av tungum traffikki útger høvuðsgøtu í bygdini, sum eitt forleingilsi av høvuðsvegnum millum ytra enda á Skálafjørðinum og knútapunktið Skipanes. Her fara tonsini við ferð framvið, aftur og fram í sambandi við grótbrotið oman fyri Lamba, Fiskamarknaðin á Toftum, Fiskavirking í Runavík og hópin av øðrum virkjum í umráðnum. Og sum menningin er í Søldarfirði í løtuni, kann roknast við enn meiri tungum trafikki í næstum.

Tað hevur í nógv Harrans ár verið diskuterað at leggja ein nýggjan landsveg oman fyri Søldarfjørð, men hetta er eitt av teimum størru mølposa projektunum ið ikki hevur hægstu raðfesting. Hinvegin hevur eisini í eina tíð verið upp á tal at leggja ein lítlan tunnil undir vegin við Skúlan fyri at verja skúlabørn og onnur gongufólk móti vandum í ferðsluni. Og her er eftir øllum at døma okkurt ítøkiligt í gongd aftan fyri kulissurnar.

»Eg minnist at tað var upp á tal í 1976 at leggja nýggjan veg oman fyri Søldarfirði,« segði fyrrverandi borgarstjórin í Runavík, Hans Tausen Olsen. »Tað lítla grótbrotið beint uttan fyri bygdina varð útpeikað sum íbindingar punkt men síðani hendi einki meira.«

Hans Tausen Olsen er tó samdur við núverandi borgmeistaran í Runavík, Rodmund Nielsen, um at vegastykkið við skúlan í Søldarfirði er meira átrokandi. Her er heldur ikki talan um nakra íløgu at samanbera við ein nýggjan landsveg.

»Vit hava arbeitt við hesum vegastrekki í nøkur ár nú,« segði Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, »men ferðin í arbeiðinum er treytað av játtan frá Løgtinginum. Vit hava eina konto fyri trygdartiltøk og tankin er at ein tunnil undir vegin við skúlan í Søldarfirði skal kunna fíggjast við hesari konto. Trupulleikin er bara at kontoin er fyri tíðina ógvuliga avmarkað og vit høvdu ein prioritet í Leynum í ár. Men vit hava arbeitt við hesum máli og kannað ferðsluna, og staðfest tørvin.«

Runavíkar Býráð vónar at næsta ár verður tunnilin undir vegin við skúlan í Søldarfirði prioriteraður.

»Vit hava vent okkum til Landsverk við einari áheitan, so teir kenna til okkara ynski. Hinvegin skilja vit teirra støðu og eg ivist ikki í at stovnurin ger sítt besta. Hvat viðvíkur einum nýggjum landsvegi oman fyri Søldarfjørð, so er talan um eina sera stóra íløgu í tí sambandinum, ein íløga sum neyvan gerst aktuell í bræði; mær vitandi fyriliggur einki projekt heldur.«

Tað ironiska í øllum málinum kann síggjast í at søldfirðingar og bilar er ein gomul greipa, enn einaferð illustrerað við einum nýggjum distributiónscentri sum Heri Thomsen Transport Service nú eru í ferð við at byggja við sjóvarmálan í Søldarfirði.




*Ferðslan fram við skúlanum í Søldarfirði er mangan tøtt.*
*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*